MENTAMÁLARÁÐIÐ

FÓLKASKÚLIN

STØDDFRØÐI

Greiðslurokning
9. flokkur

26. november
2018
kl. 9.45-13.45

Prov STOVAN

Greiðslurokning - 9. flokkur - jólaroynd 2018

1. Handilsrokning

Leivur, Hans, Martin og Karl fara á skíðferð til Fraklands í eina viku. Ferðin við uppihaldi fyri allar fýra kostar 27.984 kr.

a) Hvussu nógv skulu teir gjalda hvør?

Nógv útgerð skal keypast, áðrenn farið verður avstað.

Leivur keypir:

2 sett av termoundirklæðum

2 pør av skíðhandskum

eina skíðdrakt

einar skíðbrillur

b) Hvussu nógv kostar øll útgerðin?

c) Hvussu nógv skal Leivur gjalda til samans?

Í kostnaðinum av útgerðini, sum Leivur keypir, er MVG á 25% íroknað.

d) Rokna, hvussu nógv Leivur hevur goldið í MVG.

Teir vænta at brúka umleið 750 kr. hvør um dagin til mat o.a.

e) Hvussu nógv vænta teir at brúka til mat o.a. allan túrin hvør?

Leivur hevur savnað pengar til túrin. Hann eigur nú 20.000 kr.

f) Hvussu nógv hevur hann eftir, tá ið ferð, útgerð og kostnaður til mat o.a. er goldið?

2. Tíð, ferð og strekki

Tá ið teir koma til flogvøllin í Chambery, koyra teir 147 km við bussi til skíðstaðið í Montgenevre. Bussurin koyrir í miðal 67 km/t.

a) Hvussu langa tíð tekur tað at koyra? (tímar og minuttir)

Teir teir fara við bussinum kl. 10:45.

b) Hvat er klokkan, tá ið teir koma til skíðstaðið?

Um teir koyra sjálvir, tekur tað 1 tíma og 42 minuttir.

c) Hvussu skjótt koyra teir í miðal?

3. Gjaldoyra

Kursur:

EUR	743,49
NOK	78,54

Leivur kannar eisini, hvussu nógv tað kostar at keypa eitt kort til skíðlyftuna. Á eini síðu á internetinum sær hann, at kostnaðurin er 56 € fyri tveir dagar.

a) Hvussu nógvar krónur (DKK) kostar kortið til skíðlyftuna? (2 desimalir)

Á einari aðrari síðu sær hann, at eitt kort til skíðlyftu í Noregi kostar 1437,28 kr. fyri seks dagar.

b) Rokna, hvussu nógvar NOK hetta kortið kostar. (2 desimalir)

c) Rokna, í hvørjum landi tað er bíligari at keypa kort til skíðlyftu. (grundgev fyri svarinum)

d) Rokna, hvussu nógv prosent tað er bíligari.

4. Tríkantur



a) Rokna longdina a. (2 desimalir)

b) Rokna vinkul B. (1 desimal)

c) Rokna vinkul C. (1 desimal)

d) Neyvtekna tríkantin og tekna umskrivaða sirkulin.

5. Krossskipan

Eitt trapets ABCD hevur punktini A = (1,3) B = (4,6) C = (8,6) D = (11,3)

a) Tekna trapetsið í eina krossskipan.

b) Rokna víddina hjá trapetsinum.

c) Rokna longdina AB.

d) Snara trapetsið ABCD 900 móti urinum um punktið A.

e) Skriva krosstølini hjá punktunum B1, C1 og D1.

6. Blandaðar uppgávur

a) Loys líkningaheildina: $y=-3x+9$ og $y=2x-1$

Tú ringlar tvær ferðir við einum vanligum terningi.

b) Hvørji eru líkindini fyri, at tú fyrst fært 4 og so 5?

Ein pyramida hevur rúmdina 1600 cm^3, og víddin á grundflatuni er 400 cm^2.

c) Rokna hæddina á pyramiduni.